

*Denise Adersson, sum í eina tíð hevur verið í starvi sum kommunulækni í Vági. Um eina góða viku byrjar hon í starvi í Klaksvík. Viðtalan hjá Denise verður í viðtaluhølunum hjá Magnus Magnussen. Viðtalan hjá Magnusi er flutt í hølini hjá Steingrími Weihe*

*Mynd Álvur Haraldsen*

# Denise – ein kvinna við mongum áhugamálum

**Millum fleiri onnur áhugamál, hevur Denise Andersson eisini áhuga fyri málum. Í Svøríki arbeiddi hon saman við føroyingi, og áðrenn hon kom til Føroya, hevði hon lært seg føroyskt. Í aðru viku byrjar hon í starvi sum kommunulækni í Klaksvík**

FÓLK Á LEIÐINI
*Rúna Sivertsen*

Denise, sum eisini ber kelinavnið, Nina, er fimti ára gomul og fødd og uppvaksin í Ohio. Sum ung flutti hon til Svøríkis, har hon giftist svianum, Henry Andersson.

Saman fingu tey døturnar, Irene, sum er 20 ára gomul og Astrid, sum er 18 ára gomul.

Foreldur Denise, sum eru 74 og 76 ára gomul, búgva enn í Ohio og eru framvegis frísk og ferðug.

Denise hevur nógv áhugamál. Eitt av teimum er mál. Hon kann samskifta á 7 ymiskum tungumálum umframt sínum móðurmáli.

Frá einum føroyskum arbeiðsfelaga fekk hon áhuga fyri Føroyum og føroyskum. Hon fór tí undir at læra seg føroyskt við at lurta eftir bondum við føroyskum teksti, tó mest sangi.

Eisini er Denise tónleikakvinna og yrkjari. Hon spælir guitar og syngur egnar vísur.

Eitt annað av áhugamálum hennara er rósur. Í 8 ár var hon blaðstjóri á einum svenskum blaði, ið kallast, Rosenbladet.

Tá Denise í apríl í fjør gjørdist einkja, gjørdi hon av at gera dreymin til veruleika. Og seinast í august í fjør kom hon til Føroya og fór í avloysarastarv suðuri í Vági.

### Kend eftir einum degi

Eftir einum degi, tá hon sovnaði á eini læknavitjan, gjørdist Denise Andersson kend um alt landið.

Spurd, hvat tað var, sum hendi, sigur hon:

– Eg var sera, sera móð og kendi meg einsamalla. Í staðin fyri at greiða alt um telefonina, royndi eg at fara á vitjan heima hjá sjúklingunum. Eg hevði eg verið nógv úti í arbeiðsørindum og fingið alt ov lítlan svøvn, sigur hon.

Denise sigur, at arbeiðsbyrðan har suðuri, var nakað størri enn vanligt, tá hetta hendi.

– Mær dámar betur at síggja sjúklingin, tí tað er skjótt at fáa eina skeiva mynd, um støðan bert verður lýst um telefonina, sigur hon.

– Eg haldi, tað hevur stóran týdning at geva sær stundir at lurta eftir, hvat fólk hava á hjarta, og eg royni altíð at nýta tíð til at greiða sjúklingunum frá tí, sum bagir, sigur hon.

### Vinir í Klaksvík

Spurd, hvussu hon væntar at verða móttikin í Klaksvík, sigur Denise:

– Eg eri greið yvir, at fólk vera ivasom, og tað verður torført hjá mær at verða góðtikin av øllum - í hvussu í byrjanini, sigur hon.

– Samskifti millum lækna og sjúkling er serstakliga persónligt. Tí verður tað eisini ein spurningur, um kemi'in millum lækna og sjúkling er í lagi, sigur hon.

– At vera lækni, er eisini eitt slag av list. Tað er ikki bara læknafrøðin, sum ger teg til ein góðan lækna, tí tú mást eisini duga at lurta eftir, hvat sjúklingurin sigur, vísir hon á.

– Men eg eigi vinir í Klaksvík, og eg gleði meg at flyta norður hagar, sigur Denise Andersson at enda í samrøðu við Sosialin.

### Ikki uppsøgd

Herfyri stóð at lesa í bløðunum, at Denise Andersson var søgd úr starvi sínum í Vági. Men hetta er ikki rætt.

Starvstíðin hjá Denise har suðuri var um at vera úti, tá nógv umrødda hendingin fór fram. Eisini var longu avgjørt, at hon skuldi byrja í starvi sum kommunulækni í Klaksvík.

Í eina tíð hevur Denise, sum er amerikanskur ríkisborgari, bíðað eftir at fáa longt arbeiðsloyvi í Føroyum.

Arbeiðsloyvið varð greitt í hesi vikuni, og tá Maria á Dul, starvsfólkaleiðari, kemur aftur av ferð í Danmark, verða setanarviðurskiftini hjá Denise Andersson avgreidd. Tá kann hon byrja í starvi sum kommunulækni í Klaksvík.



**UTTAN ÚR HEIMI**

# 11. september skal kannast

**Samstundis sum amerikanski tjóðbankin hevur roknað út, at atsóknirnar 11. september í fjør kostaðu New York góðar 30 milliardir dollarar, ætlar kongressin at kanna, hvussu tað kundi henda**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*

Aftan á tann 11. september í fjør komu ymsar metingar um, hvat atsóknirnar í New York og Washington kostaðu amerikanska samfelagnum. Tølini komu heilt upp í einar 100 milliardir dollarar, men nú sigur amerikanski tjóðbankin, at atsóknin at World Trade Center kostaði New York millum 33 og 36 milliardir dollarar. Í útrokningini hjá tjóðbankanum eru allar útreiðslur og allar mistar inntøkur tiknar við.

Samstundis tykjast teir báðir flokkarnir í kongressini vera komnir á samt um at kanna, hvussu tað kundi bera til, at myndugleikarnir ikki fingu forðað atsóknunum at World Trade Center og Pentagon.

Sambært Scott McClellan, talsmanni eru republikanararnir og demokratarnir samdir um at seta eina tíggju manna nevnd við fimm umboðum úr hvørjum flokki at kanna málið. Bush forseti skal tilnevna formannin, og demokratarnir fáa so næstformannin, og nevndin skal leggja fram úrslitið innan hálvtannað ár.

Serliga demokratarnir hava strongt á fyri at fáa umstøðurnar upp undir 11. september kannaðar í kongressini, tí teir hava ikki álit á at lata ta republikansku stjórnina gera kanningina.

# Pávin vil hava fleiri børn

**Fyri fyrstu ferð í søguni hevur pávin hildið røðu í italska tjóðartinginum. Boðskapurin var greiður: Hann vil hava fleiri børn**

ITALIA
*Árni Joensen*

Tað er nú ikki pávin sjálvur, sum ætlar at økja barnatalið, og neyvan skulu boð hansara skiljast soleiðis, at hann vil hava italskar menn og kvinnur at gera meiri við tað sexuella.

Men at álvara var í orðum hansara, er eingin í iva um, tí ongastaðni í Vesturheiminum fáa fólk so fá børn sum í Italia. Almennu hagtølini siga, at í meðal fáa italskar kvinnur 0,9 barn.

ST hevur fleiri ferðir ávarað italsku myndugleikarnar um, at tað lítla barnatalið fer at koma landsins búskapi aftur um brekku, og at tað verður truplari hjá tí arbeiðandi ættarliðnum at fíggja vælferðina hjá teimum gomlu og sjúku. Tað var hetta orðaskiftið, sum Jóhannes Páll pávi nú legði seg útí. Í røðuni í tinginum bað hann italsku politikararnar laga tey fíggjarligu viðurskiftini hjá fólki so, at tey kunnu fáa fleiri børn enn nú.



*Jóhannes Páll pávi Annar varð dúgliga fagnaður aftan á røðuna í italska tjóðartinginum*
*Mynd: Reuters*

Í røðuni nam pávin eisini við tey mál, sum hann plagar at tosa um so sum mannavirði, demokrati, frið og rættvísi.

# Irakska andstøðan ósamd

**Útlagna irakska andstøðan, sum USA stuðlar, hevur avlýst eina ráðstevnu orsakað av innanhýsis ósemju**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen*

Amerikanska stjórnin hevur seinastu tíðina lagt stóran dent á at fáa teir ymsu útlagnu iraksku andstøðubólkarnar at samstarva, tí andstøðan skal møguliga taka við valdinum, tá og um Saddam Hussein, forseti verður feldur.

Tað hevur kortini víst seg at vera trupult at fáa semju millum teir seks iraksku bólkarnar, og í gjár noyddust teir at avlýsa eina ráðstevnu, sum skuldi verða í Bruxelles í næstu viku. Orsøkin er, at partarnir kundu ikki semjast um, hvørji mál skuldu á dagsskránna, og hvussu mong umboð teir einstøku bólkarnir skuldu hava á ráðstevnuni.

Amerikanska stjórnin hevur viðurkent teir seks andstøðubólkarnar, og herfyri vóru umboð fyri bólkarnar í Washington og tosaðu við stjórnina um, hvat skal henda í Irak, eftir at Saddam Hussein er farin frá.

Eygleiðarar siga, at ósemjan millum teir seks bólkarnar er so stór, at í veruleikanum er ikki talan um nakað beinleiðis samstarv.

## Onga olju á sjógvin

Í Danmark hevur Hans Christian Schmidt, umhvørvismálaráðharri gjørt av at broyta lógina, sum gevur skipum loyvi at koyra upp til 50 litrar av olju á sjógvin uttan at verða revsað fyri tað.

Ráðharrin sigur, at hann kann ikki góðtaka, at skip yvirhøvur hava loyvi at koyra olju á sjógvin, og tí skal lógin broytast, sigur hann. Tað er eisini líkt til, at hann fær meiriluta í Fólkatinginum fyri lógarbroytingini.

Danska sjóverjan hevur ofta kært seg um, at skip kunnu koyra olju á sjógvin uttan at verða revsað. Men gongur tað, sum Hans Christian Schmidt ætlar, kann sjóverjan eina ferð næsta ár taka skip, sum lata tað minsta av olju á sjógvin.

## Royna at drepa hann

Mirjana Markovic, sum er gift við fyrrverandi jugoslaviska forsetanum, Slobodan Milosavic, sigur, at krígsbrotsmannadómstólurin í Haag roynir at taka lívið av manninum.

Í einari samrøðu við eitt blað í Serbia sigur Mirjana Markovic, at maður hennara er troyttur og hevur alt ov høgt blóðtrýst. Í síðstu viku avgjørdi rætturin í Haag at útseta rættarmálið, so læknar kunnu kanna heilsustøðuna hjá fyrrverandi forsetanum.

Tann 61 ára gamla fyrrverandi forsetafrúan og aðrir stuðlar hjá Slobodan Milosevic hava leingi roynt at fáa dómstólin í Haag at lata hann leysan. Mirjana Markovic sigur, at tað, sum rætturin ger ímóti manni hennara, er einki minni enn eitt brotsverk.

## Drápsmenn fyri rættin

Mánadagin fer ein rættur í Mosambik undir rættarmálið ímóti fimm monnum, sum eru ákærdir fyri at hava beint fyri tíðindamanninum Carlos Carduso.

Carduso, sum hevði norska konu, varð skotin á gøtuni í høvuðsstaðnum Maputo fyri tveimum árum síðani. Nakað frammanundan hevði hann skrivað eina røð av greinum, har hann avdúkaði umfatandi korrupsjón í stjórnarumsitingini.

Fjølmiðlar í Mosambik ivast ikki í, at boðini um morðið komu frá politisku leiðsluni. Serliga ein sonur Chissano forseta og ein fyrrverandi ídnaðarmálaráðharri eru undir illgruna fyri at hava givið teimum fimm monnunum boð um at myrða tíðindamannin, men enn er hvørgin teirra skuldsettur. Tað er kortini væl hugsandi, at teir verða drignir fyri rættin seinni.

## Fáa bíligari heilivág

Tey fátæku londini skulu í framtíðini fáa bíligari heilivág ímóti herviligum sjúkum sum eitt nú eyðkvæmi, malaria og tuberklum.

Á fundi í heimshandilsfelagsskapinum WTO eru handilsmálaráðharrar úr øllum heiminum vorðnir samdir um at loyva nøkrum londum at framleiða eftirgjørdan heilivág, sum kann seljast teimum fátæku londunum.

Hetta sama málið var á borðinum, tá WTO helt fund í Qatar í fjør, men tað bar ikki til at finna eina semju. Á fundinum hesaferð, sum hevur verið í Sidney í Avstralia, eydnaðist tað, og tí kunnu tey fátæku londini nú fáa bíligari heilivág ímóti eyðkvæmi, malaria, tuberklum og øðrum ringum sjúkum. Júst prísuin hevur forðað fyri, at tey fátæku londini hava kunnað keypt heilivágin.